# igarettir á flogvøllinum



*Fleiri kundu hugsa sær at keypt onkra vøru í tollfríu sølubúðunum, men tað sleppur ongin fyrr enn seinnapartin, tá veruligir kundar koma*
*Mynd: Jens Kristian Vang*



*Úrvalið av spiritus er rímiliga stórt í Vága Floghavn*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

di so eisini gjørt, at mann spardi eitt sindur av brennievni, og tí hevur minni útlát.

Eisini løgdu menn dent á, at hetta fór at verða ein fyrimunur fyri raksturin hjá Vága Floghavn, tí ein partur av peninginum úr búðunum fer beinleiðis til Floghavnina.

**Broytingartíð**

Magni Arge fegnaðist somuleiðis, at Atlantsflog hevur fingið møguleika at selja, tí fleiri vóru um boðið. Hann kallaði eisini dagin, ein dag við nýggjum vindum. Hinvegin legði hann eisini dent á, at hetta verður ein avbjóðandi tíð, har Atlantsflog skal læra av hesi nýggju byrjan.

- Vit fara at nýta okkara royndir. Vit eru von við at arbeiða við tollfríari vøru og eisini tá tað er trongt. Men vit skulu læra nógv í hesi fyrstu tíðini, tí hetta er ikki heilt tað sama, greiddi stjórin í Atlantsflogi frá.



*Bergtóra Nielsen, flogterna, lat fyrsta tollfría handilin í Vága Floghavn upp. Magni Arge gleðist um, at Atlantsflog fekk tollfríu søluna*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Spara flogternu**

Av tí at tollfría sølan er flutt á land, so sparir Atlantsflog eina flogternu í flogfarinum. Tí nú verður minni at gera inni í flogførunum. Samstundis merkir hetta, at fleiri fólk skulu arbeiða á landi.

Sum skilst verður tískil ikki talan um uppsagnir hjá Atlantsflogi.

**Terna lat upp**

Tá stóru grindirnar við sølubúðina, har viðføri kemur, fóru upp, tá var Bergtóra Nielsen fyrsta fólkið í búðini.

Bergtóra Nielsen hevur starvast hjá Atlantsflogi síðan fyritøkan byrjaði fyri einum 20 árum síðani. Hon skal hava ein avgerandi leiklut í samband við tollfríu søluna.

## Alarmurin riggar

**Trygd skal eisini til, tá so stórar mongdir av spiritus, sigarettum og øðrum luksusvørum eru savnaðar. Hetta sær út til at rigga á flogvøllinum, tí tá tíðindafólk sluppu at síggja tollfríu sølubúðina við fráferðarhølið, fór ein øgiligur alarmur í gongd**

TOLLFRÍ SØLA
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Stjórin í Atlantflogi beyð ymiskutíðindafólkunum, sum vóru møtt til samkomuna við tollfríu søluni, við at síggja sølubúðina við fráferð.

Eftir at øll vóru komin ígjøgnum eina trygdarkanning – á sama hátt sum til vanliga fráferð, har onkur enntá mátti kropskannast – gjørdu starvsfólk hjá Atlantsflogi eina roynd at lata sølubúðina upp. Í tí grindin fór uppeftir fór ein alarmur í gongd, og hesin var ikki tespiligur at hoyra. Tá ein løta var gingin, var onkur, ið fann út av at sløkkja alarmin, og fegin var Magni Arge at vísa hesa seinnu sølubúðina fram, í friði og náðum.

**Luftigari búð**

Einasti veruligi munurin millum sølubúðina við fráferð og komu er, at búðin við fráferð hevur tveir veggir heldur enn fýra. Hetta hevur við sær, at búðin sýnis hópin størri, hóast útboði av vørum og prísstøði er tað sama sum í hinari sølubúðini.

CO2 lán
– minni orkuútreiðslur,
betri umhvørvi
SUÐUROYAR SPARIKASSI
